Fyrivarni verður tikið fyri villum


**HYUNDAI SONATA**
Árg 1998, Km 30.424. v/sportfelgum. Kr. 128.000.


**PEUGEOT 406**
Árg 1997, Km 55.150. v/sportfelgum. Kr. 127.500.


**HONDA ACCORD**
Árg 1997, Km 46.727. v/sportfelgum. Kr. 130.000.


**FORD FIESTA**
Árg 1997, Km 81.419. diesel. Kr. 83.000.


**HYUNDAI ACCENT**
Árg 2000, Km 15.014. v/ aircondition. Kr. 108.000.


**HONDA CIVIC**
Árg 1995, Km 66.400. v/sportfelgum. Kr. 89.000.


**HONDA CIVIC 1.5 VETEC**
Árg 1997, Km 79.866. v/spoilara. Kr. 110.000.


**FORD FOCUS CHIA**
Árg 1999, Km 26.371. Kr. 140.000.


**MITSUBISHI 1.6 GLXI**
Árg 1996, Km 133.000. Kr. 80.000.


**MITSUBISHI GALANT V/TIPTRONIC**
Árg 2000, Km 17.000. senkaður, 17" felgur. Kr. 220.000.


**HYUNDAI ELANTRA V/SPORTFELGUM**
Árg 1998, Km 37.411. senkaður og CD . Kr. 120.000.


**BMW325 IX 4X4**
Árg 1988, Km 128.000. leður inntrekk. Kr. 75.000.


**OPEL OMEGA**
Árg 1989, Km 126.000. nýsýnaður. Kr. 30.000.


**HONDA CIVIC**
Km 31.000. Kr. 125.000.


**OPEL VECTRA TURBO DIESEL**
Árg 1996, Km 149.000. Kr. 115.000.


**MAZDA 323**
Árg 1997, Km 39.000. Kr. 95.000.


**MITSUBISHI LANCER GLX**
Árg 1989, Km 120.000. nýsýnaður. Kr. 35.000.


**OPEL ASTRA DIESEL**
Árg 1996, Km 88.000. Kr. 85.000.


**NISSAN MICRA**
Árg 1996, Km 95.000. Kr. 65.000.


**SKODA OCTAVIA GLXI**
Árg 2000, Km 12.000. Kr. 138.000.


**TOYOTA HIACE**
Árg 1987, Km 184.000. Kr. 23.000.


**HONDA HRV 4X4**
Árg 2001, Km 234. v/spoilarasetti. Kr. 235.000.


**HONDA ACCORD**
Árg 1996, Km 81.000. Kr. 120.000.

**MITSUBISHI GALANT**
F88142
Árg 1992, Km 142.000. Kr. 70.000.


**BMW 520I 6 SYL.**
Árg 1989, Km 312.000. Kr. 85.000.


**VW GOLF DIESEL**
Árg 1992, Km 204.000. Kr. 78.000.


**RASARABÁTUR V6 MOTOR 200 HK**
v/vogni til sølu.


**BAYLINER BÁTUR, 200 HK MOTOR**
v/vogni til sølu.

SKODA AUTO · HONDA · HYUNDAI

**NORDBIL v/ Oyggjarvegin tel 313707**


**TOYOTA LANDCRUISER**
EN151
Árg 1986, Km 115.000. v/setrum aftan. Kr. 55.000.


**OPEL VECTRA V6 170 HK**
HA053
Árg 15 mdr, Km 12.000. aircond.antispinn. Kr. 219.000.

**VOLVO S40**
SP352
Árg 3 ár, Km 55.000. sera væl hildin. Kr. 165.000.

**VÆL ÚTGJØRDUR VOLVO S40**
Árg 1999, Km 35.000. v.sportfelgum. Kr. 190.000.


**VOLVO 460 1.8I**
Árg 97, km 58.000, kr 98.000

VOLVO
RENAULT

Hoyvíksvegur
tel 322110

VR BILAR


**BMW 535I**
Árg 1988, til sølu um hóskandi boð fæst. Kr. .
*Tlf 221202*


**VW TRANSP. MULTI VAN CLASSIC**
Árg 1995, Km 162.000. Diesel, sóltak sentrallás, útgjørdur til kamping, nýprísur 480.000. Kr. 185.000.
*Tlf. 212767*


**PEUGEOT 306 TURBO D**
Árg 1995, Km . Kr. 90.000.
*Tlf 252070*


**SCANIA P93**
Árg 1991, Km . Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfrig), og er í góðum standi.. Kr. .
*Tlf. 314728*


**MAZDA 626 GLX 22I**
Árg 1991, 16"AZEV felgur, nýlakeraður, senkaður og sera væl hildin. Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 221686 ella 443218*


**MAZDA 323F**
Árg. 1998, koyrt 42.000 km., 148 hk, 6 cyl. til sølu fyri kr. 120.000. Bilurin er rustbehandlaður og eyka felgur fylgja vi?. Nýprísur kr.195.000
*Tlf. 443080/216080*

ítróttur

Nr. 84 • hósdagur • 3. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# FM í badminton

**Hetta vikuskiftið var FM í badminton fyri meistarabólkin leikt í Badmintonhøllini í Havn. Leikt var í einmansleiki, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki**

BADMINTON
*tíðindaskriv*

FM í Badminton hevur verið hettar vikuskifti, og spenningurin var stórur um hvør fór at vinna í ár. Tað sum hevur havt størsta spenning hevur verið einmansleikur hjá monnum. Í ár var tað verið serliga spennandi, tí Ragnar Rasmussen, sum vann í fjør, gongur á Badminton Acadamininum í Keypmannahavn, og at Runi Orloff sum er ein av teimun ungu talentunum hjá Hvidovre Badminton klub.

### Einmansleikur hjá monnum

Semifinalurnar vóru sera spennandi Erland vann við 2 settum ímóti einum á Rúna, meðan Ragnar vann á Heðin Joensen eisini við 3 settum. So finalan í ár var tann sama sum seinasta ár. Tað vil siga millum Erland Poulsen og Ragnar Rasmussen. Í fjør vann Ragnar ein lættan dyst, men í ár hendi tað øvugta, nvnmliga at Erland bukaði Ragnar av.

### Einmansleikur hjá kvinnum

Eins og hjá monnunum vóru hálvfinalurnar sera spennandi. Ingun Hansen, Strálan, vann í hørðum trýsett dysti á Elini Jacobsen, meðan Guri Poulsen somuleiðis vann á Guðrun Jacobsen í 3 setti. Finalan stóð sostatt millum Ingun og Guðri, og var hendan finalan kanska tann best spælda og mest spennandi. Guðri vann fyrsta setti og roknast kundi nú við, at hon fyri fyrstu ferð fór at vinna meistaraheiti hjá kvinnum. Við stórum treiskni fekk Ingun tó fatur á dystinum aftur. Hon stríddist sera væl, eftir umbóltar í triðja setti megnaði hon enn eina ferð at tryggja sær meistaraheitið.

### Tvímansleikur

Tvímansleikin hjá monnum vunnu útisetarnir Rúni Orloff og Ragnar Rasmussen á Erland Poulsen og Rana í Líð. Fyrsta sett vunnu teir lættliga meðan seinna setti var sera javnt. Her var talan um eitt slag av moralskari finalu í hálvfinaluni. Har spældu útisetarnir báðir ímóti okkara ungu spælarum Bjartur Lamhauge og Aksel Poulsen. Hesin dysturin var sera væl spældur, og fingu útisetarnir ein sera harðan dyst, sum teir tó at enda vunnu eftir trý hørð sett.

Hjá kvinnunum vunnu Ingun Hansen Strálan og Kristianna Torkilshøj á Elini Jacobsen og Guðrun Jacobsen. Sigurin hjá teimum báðum var rættiliga tryggur, og gjørdist talan ongan tíð um nakra serliga spennandi uppgerð.

Í blandaðuum tvímansleiki gjørdist talan heldur ikki um tað heilt spennandi finaluna. Veteranurin, Heðin Joensen, hevði saman við Elini Jacobsen vunnið seg fram til finaludystin, men her vóru tey greitt í undirluta móti Erlandi Poulsen og Guðri Jacobsen.

Endaligu úrslitini av kappingini gjørdust sostatt hesi:

**Einmansleikur kvinnur:**
Ingun Hansen (Strálan) – Guðri Poulsen (HBF): 9-1, 11-6, 13-10

**Einmansleikur menn:**
Erland Poulsen (HBF) – Ragnar Rasmussen (HBC): 15-4, 15-6

**Tvímansleikur kvinnur:**
Ingun Hansen (Strálan) og Kristianna Thorkildshøj (HBF) – Elin Jacobsen (HBF) og Guðrun Jacobsen (HBF): 17-14, 15-11

**Tvímansleikur menn:**
Ragnar Rasmussen (HBC) og Rúni Orloff (HBC) – Erland Poulsen (HBF) og Rani í Líð (HBF): 15-8, 15-13

**Blandaður tvímansleikur:**
Erland Poulsen (HBF) og Guðri Poulsen (HBF) – Heðin Joensen (HBF) og Elin Jacobsen (HBF): 15-4, 17-14


*Í einmansleiki í kvinnum stóð finalan ímillum Guðri Poulsen og Ingun Hansen*


*Finalistarnir í tvímansleiki hjá kvinnum síggjast her við heiðursmerkjunum*


*Erland Poulsen, Rani í Líð, Ragnar Rasmussen og Rúni Orloff, sum leiktu finaludystin hjá monnum*